

# Lundin Petroleum kann verða næsta oljufelagið sum verður keypt

**Jógvan Hugo Gardar**

17.05.2015 - 13:48

Oljan.fo

Wall Street Journal hevur hugt eftir oljufeløgum í Evropa, og mett um hvat fyri felag sum eitt av stóru oljufeløgunum vil keypa. Lági oljuprísurin hevur lagt trýst á fleiri oljufeløg, ið hava strilti við at fáa endarnar at røkka saman við einum oljuprísi sum liggur um 60 dollarar fyri fatið ella lægri.

Fleiri av oljufeløgunum hava atgongd til áhugaverd leitiloyvir, men spurningurin er um tey hava fíggjarliga styrki til at bera tann kostnaðin sum skal til. Atlantic Petroleum er eitt felag sum leggur seg eftir at koma inn í loyvini tíðliga, fyri síðani at selja burturav nærri ein kemur framleiðsluni.

Føroyska Atlantic Petroleum er tó ikki millum tey trý feløgini sum Wall street Journal metir eru tey fyrstu sum kunnu verða keypt av størri felagið. Gitingarnar um hvør sum verður keyptur nú, eru farnar at gerast nógvar, aftaná at Shell nýliga keypti bretska BG Group.

Greinarar sum Wall Street Journal hava tosað við meta at størstur áhugi er fyri Tullow Oil, sum er størsta sjálvstøðuga oljufelagið í Bretlandi; síðani er tað General Energy, ið framleiðir olju í Kurdistan og triðja felagið sum verður nevnt er Lundin Petroleum, svenska oljufelagið sum millum annað er við í stóru Johan Sverdrup-ætlanini, har Statoil er fyristøðufelag.

Á myndini niðanfyri er møguligt at síggja hvørji hesi trý oljufeløgini eru, og hvar tey serliga eru virkin.

